# P/F VÁGATUNNILIN

## TÓRSHAVN

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2007

**(9. ROKNSKAPARÁR)**

**AVRIT**

## INNIHALDSYVIRLIT


Síða

Upplýsingar um felagið ........ 2

Ársfrágreiðing ........ 3

Leiðsluátekning ........ 4

Grannskoðanarátekning ........ 4

Nýttur roknskaparháttur ........ 5 - 7

Rakstrarroknskapur 2007 ........ 8

Fíggjarstøða pr. 31. desember 2007 ........ 9 - 10

Gjaldførisfrágreiðing 2007 ........ 11

Notur ........ 12 - 13

Eventualskyldur og tryggingarviðurskifti ........ 13 - 14

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Vágatunnilin |
| Heimstaður: | FO-100 Tórshavn |
| Skattakommuna: | Tórshavnar Kommuna |
| Stovningardagur: | 21. desember 1998 |
| Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |
| V-tal: | 485.209 |

**Nevndin**
Bjarni Askham Bjarnason, búskaparfrøðingur, Tórshavn, formaður
Jens Kári Vilhelm, verkfrøðingur, Hoyvík, næstformaður
Dánial Thomsen, fíggjarleiðari, Sandavágur
Mathea Hilduberg, cand. merc. í marknaðarføring, Tórshavn
Marita Hentze, verkfrøðingur, Argir

**Stjórn**
Uni Danielsen, Hoyvík, stjóri

**Fíggjarleiðari**
Reinhold Isaksen, búskaparfrøðingur, Norðragøta

**Grannskoðan**
P/F Grannskoðaravirkið ***INPACT***
statsaut. revisorar
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Tlf.: 31 47 00 - Fax: 31 38 15
T-postur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársroknskapurin 2007 er góðkendur á felagsins aðalfundi, hin _____/_____-2008.

_________________________
fundarstjóri

## ÁRSFRÁGREIÐING 2007

**Virksemi**
Endamál felagsins er at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur og fasta sambandið um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið. Felagsins virksemi í farna ári hevur í høvuðsheitum verið at reka tunnilin undir Vestmannasund og annars at gera neyðugar ábøtur. Undirsjóvartunnilin varð latin upp fyri almennari ferðslu 10. desember 2002.

**Lógargrundarlag**
Partafelagið varð stovnað við 20,3 mió.kr. í løgujáttan á fíggjarløgtingslógini og eykajáttanarlógini fyri 1998. Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan 160,3 mió.kr., krøv til felagið, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning eru ásett í Ll. nr. 6 frá 08.02.2000 (Anleggslógin) um "fast samband um Vestmannasund".

**Fíggjarliga gongdin**
Alt fleiri viðskiftafólk velja at nýta teir avsláttarmøguleikar, sum eru. Eindarprísurin lækkaði í juni 2007 við 25%, men av tí at talið av ferðandi samstundis er hækkandi, hevur tann negativa ávirkanin á nettosøluna ikki verið so stór sum væntað. Felagið fekk 2,6 mió.kr. á fíggjarlógini, sum ískoyti til tekniskan rakstur. Uml. 10% av nevndu lækking er grundað á játtanina frá landinum.

Kostnaður til vanligan rakstur er lítið broyttur, í mun til undanfarna ár.

**Menningarkostnaður**
Felagið hevur havt ávísan kostnað til kunnandi tiltøk og tilfar.

**Íløgur**
Felagið hevur í árinum gjørt íløgur fyri kr. 222.026 í rakstrartól og tøkni.

**Hendingar aftaná roknskaparárslok**
Frá statusdegnum og til í dag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársroknskapinum.

**Framtíðarútlit**
Gongdin higartil vísir, at túratalið er hækkandi. Tann økta nýtslan av avsláttarskipanum hevur tó eina útjavnandi ávirkan. Støða er enn ikki tikin til um stuðul til tekniska raksturin verður játtaður á komandi fíggjarlóg fyri 2008.

**Partaeigaraviðurskifti**
Partapeningurin er kr. 160.300.000. Allur partapeningurin er ogn landsins.

**Býtið av ársúrslitinum**
Ársúrslitið er **kr. 1.858.208,** ið nevndin mælir til at býta soleiðis:

| | |
|---|---:|
| Flutt frá undanfarnum árum | 801.947 |
| Ársúrslitið 2007 | 1.858.208 |
| **At flyta til næsta ár** | **2.660.154** |

**Eginpeningurin** verður nú **kr.** **162.960.154**

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin við ársfrágreiðingini fyri 2007 hjá P/F Vágatunlinum.

Ársroknskapurin er settur upp samsvarandi ásetingum í galdandi ársroknskaparlóg.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársfrágreiðingin og ársroknskapurin fyri 2007 verða hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 28. mars 2008

Stjórn: Uni Danielsen

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nevnd: | Bjarni Askham Bjarnason<br>formaður | Jens Kári Vilhelm<br>næstformaður | Dánial Thomsen |
| | Mathea Hilduberg | Marita Hentze | |

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til eigararnar í P/F Vágatunlinum**

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vágatunlinum, Tórshavn, fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2007. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjaligu støðu 31. desember 2007 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1 januar – 31. desember 2007 samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tórshavn, tann 28. mars 2008

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

Sunnuvá Bjarnastein

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársroknskapurin hjá P/F Vágatunlinum, Tórshavn, fyri 2007 er greiddur í samsvari við ársroknskaparlógina og roknskaparkunngerð. Rakstrarroknskapurin er uppsettur eftir greinbýttum frásøguhátti og fíggjarstøðan eftir kontuhátti. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá árinum fyri.

**Alment**
Allar inntøkur verða førdar í rakstrarroknskapinum, so hvørt tær verða vunnar. Allur kostnaður, sum hoyrir árinum til, verður tikin við í rakstrarroknskapinum, eisini avskrivingar og niðurskrivingar.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

**Nettosøla**
Nettosølan er øll fakturerað og kontantsøla, har tænastan er veitt keyparanum innan árslok. Meirvirðisgjald verður ikki roknað av nettosøluni.

**Rakstrarkostnaður**
Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá fyritøkuni. Meirvirðisgjald verður roknað av rakstrarkostnaði.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar- og eftirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

**Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður**
Aðrar rakstrarinntøkur og annar rakstrarkostnaður fevna um inntøkur og kostnað, sum ikki hoyra til høvuðsraksturin hjá fyritøkuni.

**Menningarkostnaður**
Menningarkostnaður er kostnaðarførdur, tá slíkur kostnaður er komin fyri.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður eru rentuinntøkur og –kostnaður, umframt ásannaðar og ikki-ásannaðar kursbroytingar viðvíkjandi áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra. Rentukostnaður av lánum er roknaður fram til árslok.

**Óvanligar inntøkur og kostnaður**
Óvanligar inntøkur og kostnaður fevna um upphæddir, ið ikki eru afturvendandi, og sum ikki hava nakað við vanliga rakstur felagsins at gera.

**Skattur**
Skattur verður kostnaðarførdur við tí upphædd, sum viðvíkur ársúrslitinum. Kostnaðarførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

## FÍGGJARSTØÐAN

**Materiell støðisogn**
Vegir, brúgvar, undirsjóvartunnil, tekniskur útbúnaður, tøkni, rakstrartól og innbúgv eru tikin við til útvegnarvirði, frádrigið avskrivingar. (Scrap-) avhendingarvirðið, sambært § 1,4 í ”Anleggslógini”, er sett til kr. 160.300.000.

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, verða kostnaðarførd.

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og restvirði (livitíð) og verða gjørdar við eins stórum árligum prosentparti. Fyrsta árið verður avskrivað frá keypsmánaðinum:

| | |
|---|---|
| Vegir og undirsjóvartunnil | 10 - 14 ár |
| Tøkniútbúnaður | 3 - 5 ár |
| Rakstrartól | 5 ár |
| Innbúgv | 10 ár |

**Vørugoymsla**
Kubbar og eykalutir á goymslu verða virðisásett til kostvirði eftir FIFO-háttinum. Um realisatiónsvirðið er lægri, verður tað nýtt.

**Áogn**
Áognin er tikin við til áljóðandi virði. Tapsvandi verður gjørdur upp eftir einstaklingametingog frádrigin í rakstrinum.

**Avsetingar til útsettan skatt**
Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá, at inntøkur og kostnaður ikki verða tikin við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuni í sama tíðarskeiði.

**Skuld**
Skuld verður tikin við til áljóðandi virði við árslok.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra**
Flytingar í útlendskum gjaldoyra eru í árinum roknaðar um til kursin tann dagin, flytingin er gjørd.

**Frammanundangoldin kubbahald**
Frammanundangoldin kubbahald eru tikin við til áljóðandi virði frá byrjan og fram til roknskaparárslok.

**Trygd, kubbar**
Trygd, kubbar eru tiknir við til áljóðandi virði, svarandi til kr. 300 fyri hvønn teknaðan kubba.

**Eventual- og veðhaldskyldur**
Veðhalds- og aðrar skyldur verða upplýstar í ársroknskapinum.

**Gjaldførisfrágreiðing**
Gjaldførisfrágreiðing er uppsett eftir óbeinleiðisháttinum og vísir gjaldførisávirkanina frá rakstri, íløgum og fígging. Gjaldføri við ársbyrjan og við ársenda eru samansett av tøkum peningi, frádrigið saldu á rakstrarláni.

*Gjaldføri frá rakstri*
Gjaldføri frá rakstrinum verður gjørt upp sum rakstrarúrslitið javnað fyri upphæddum, sum hava gjaldførisávirkan, broytingum í rakstrarkapitali og goldnum partafelagsskatti.

*Gjaldføri frá íløgum*
Gjaldføri frá íløgum eru útveganarvirði á gjørdum íløgum í støðisogn og møguligum søluupphæddum frá seldum støðisognum í árinum.

*Gjaldføri frá fígging*
Gjaldføri frá fígging umfatar broytingar í partapeningi felagsins, lánsupptøku, goldnum avdráttum og goldnum vinningsbýti til partaeigararnar.

**RAKSTRARROKNSKAPUR 2007**

| | Nota | 2007 | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| **Nettosøla** | | **25.439.014** | **27.666** |
| Endurgjald, umsiting Norðoyatunnilin | | 2.257.864 | 1.536 |
| Rakstrarkostnaður | | -4.769.194 | -3.276 |
| Fyrisitingarkostnaður | | -1.283.583 | -1.126 |
| **Bruttoúrslit** | | **21.644.101** | **24.800** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -2.907.991 | -2.764 |
| Avskrivingar | 2 | -12.187.201 | -12.286 |
| **Úrslit frá primerum rakstri** | | **6.548.909** | **9.751** |
| Rentuinntøkur | | 12.963 | 6 |
| Rentukostnaður | | -4.295.764 | -5.310 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **2.266.108** | **4.447** |
| Skattur | 5 | -407.900 | -795 |
| **Ársúrslit** | | **1.858.208** | **3.651** |

Býtið av ársúrslitinum sæst í ársfrágreiðingini.

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2007

| OGN | Nota | 2007 | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | | 245.776.433 | 257.156 |
| Tøkniogn | | 2.366.535 | 2.905 |
| Rakstrartól og innbúgv | | 183.092 | 274 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | 2 | **248.326.060** | **260.335** |
| Kubbar | | 250.973 | 127 |
| Eykalutagoymsla | | 189.787 | 190 |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **440.760** | **317** |
| Vøru- og tænastuáogn | | 2.029.096 | 5.519 |
| Meirvirðisgjald | | 265.916 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | | 28.350 | 0 |
| **Áogn tilsamans** | | **2.323.362** | **5.519** |
| Innlánspeningur | | 16.567.617 | 2.907 |
| **Peningur tilsamans** | | **16.567.617** | **2.907** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **19.331.739** | **8.742** |
| **OGN TILSAMANS** | | **267.657.799** | **269.077** |

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2007

| **SKYLDUR** | Nota | 2007 | t.kr. 2006 |
|---|---|---|---|
| Partapeningur | 3 | 160.300.000 | 160.300 |
| Flutt úrslit | 4 | 2.660.154 | 802 |
| **Eginpeningur tilsamans** | | **162.960.154** | **161.102** |
| Avsett til eventualskatt | | 1.203.326 | 795 |
| **Avsetingar tilsamans** | 5 | **1.203.326** | **795** |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | | 75.619.706 | 85.330 |
| **Langfreistað skuld** | 6 | **75.619.706** | **85.330** |
| Avdráttir, veðskuld næsta ár | 6 | 10.000.000 | 13.735 |
| Avsett frítíðarløn | | 30.543 | 31 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 1.114.503 | 1.172 |
| Meirvirðisgjald | | 0 | 100 |
| Frammanundan goldin kubbahald | | 5.092.982 | 5.277 |
| Trygd, kubbar | | 1.457.700 | 1.288 |
| P/F Norðoyatunnilin, millumrokning | | 3.311.584 | 248 |
| Tíðaravmarkingar | | 6.867.300 | 0 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **27.874.613** | **21.850** |
| **Skuld tilsamans** | | **103.494.319** | **107.180** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **267.657.799** | **269.077** |

## GJALDFØRISFRÁGREIÐING 2007

| | 2007 | t.kr. 2006 |
|---|---|---|
| Úrslit, av primerum rakstri | 6.548.909 | 9.751 |
| Avsett frítíðarløn | 0 | -5 |
| Avskrivingar | 12.187.201 | 12.012 |
| | **18.736.110** | **21.757** |
| Broytingar í ogn í umferð | | |
| Vørugoymsla, kubbar | -124.006 | -63 |
| Vøru- og tænastuáogn | 3.461.567 | -3.676 |
| Meirvirðisgjaldsáogn | -265.916 | 209 |
| | | |
| Broytingar í stuttfreistaðari skuld | | |
| Roknað renta | 0 | -299 |
| Frammanundan goldin tænastugjøld | -183.791 | 790 |
| Vøru- og tænastuskuld | 9.773.604 | 145 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit frá primerum rakstri** | **31.397.569** | **18.863** |
| | | |
| Rentuinntøkur | 12.963 | 6 |
| Rentukostnaður | -4.295.764 | -5.310 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit frá rakstri** | **27.114.767** | **13.560** |
| | | |
| Broyting, íløgur undirsjóvartunnil | 0 | 283 |
| Broyting, íløgur tøkniogn | -202.826 | -695 |
| Broyting, íløgur rakstrartól og innbúgv | 24.500 | -21 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit eftir íløgur** | **26.936.441** | **13.126** |
| | | |
| Inngjøld, trygd kubbar | 169.500 | 231 |
| Broyting, lán Íleggingargrunnurin | -13.444.847 | -11.187 |
| | | |
| **Gjaldførisúrslit eftir fígging** | **13.661.094** | **2.171** |
| | | |
| Tøkur peningur, primo | 2.906.522 | 736 |
| | | |
| **Tøkur peningur, ultimo** | **16.567.617** | **2.907** |

## NOTUR TIL ROKNSKAPIN

| | | t.kr. |
|---|---|---|
| | 2007 | 2006 |
| **Nota 1. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Lønir | 2.517.873 | 2.411 |
| Eftirlønir | 256.027 | 222 |
| Almenn lønargjøld | 78.368 | 82 |
| Starvsfólkakostnaður | 55.723 | 49 |
| | **2.907.991** | **2.764** |
| Harav til | | |
| Stjórn | 200.277 | 315 |
| Nevnd | 146.160 | 146 |
| Ársverk felagið hevur havt er umleið | 8 | 8 |

| **Nota 2. Materiell støðisogn** | Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | Tøkni og maskinur | Rakstrartól og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Virði 01.01.2007 | 302.065.074 | 6.370.613 | 838.995 |
| Tilgongd 2007 | 0 | 222.026 | 0 |
| Frágongd 2007 | 0 | -19.200 | -24.500 |
| **Virði 31.12.2007** | **302.065.074** | **6.573.439** | **814.495** |
| Avskrivingar 01.01.2007 | -44.909.014 | -3.465.556 | -565.177 |
| Avskrivingar 2007 | -11.379.627 | -741.347 | -66.226 |
| **Avskrivingar 31.12.2007** | **-56.288.642** | **-4.206.904** | **-631.403** |
| **Bókført virði 31.12.2007** | **245.776.433** | **2.366.535** | **183.092** |
| Bókført virði 31.12.2006 | 257.156.060 | 2.905.057 | 273.818 |

| | | | t.kr. |
|---|---|---|---|
| **Nota 3. Partapeningur** | | 2007 | 2006 |
| Partapeningurin er býttur upp í hesar flokkar: | | | |
| A-partabræv á | 20.300.000 | 20.300.000 | 20.300 |
| A-partabrøv á | 20.000.000 | 140.000.000 | 140.000 |
| | | **160.300.000** | **160.300** |

Øll partabrøvini hava eins rættindi.

| | 2007 | t.kr. 2006 |
|---|---|---|
| **Nota 4. Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 160.300.000 | 160.300 |
| | | |
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | 801.946 | -2.849 |
| Fluttur partur av úrslitinum í árinum | 1.858.208 | 3.651 |
| | | |
| Flutt úrslit | 2.660.154 | 802 |
| | | |
| **Eginpeningur tilsamans** | **162.960.154** | **161.102** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 5. Skattur** | | |
| Útsettur skattur við ársbyrjan | 795.425 | 0 |
| Útsettur skattur við ársenda | -1.203.326 | -795 |
| | | |
| Skattur í árinum | **-407.900** | **-795** |
| | | |
| **Skattur goldin í árinum** | **0** | **0** |

| **Nota 6. Veðskuld** | Restskuld 31.12.2007 | Fellur innan 1 ár | Restskuld eftir 5 ár | Restskuld 31.12.2006 |
|---|---|---|---|---|
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | **85.619.706** | **10.000.000** | **35.619.706** | **99.065** |

Við verandi lánisáttmála við árslok 2007.

| **Veð- og eventualskyldur** | Veð lýst í | Veðupphædd |
|---|---|---|
| 1. Veð. Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 401b Kvívík | 200.000.000 |
| 1. Veð. Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 373e Sandavágur | 200.000.000 |
| 1. Veð. Skbr. Íleggingargrunnurin, | leysafæ, tekniskur útbúnaður | 200.000.000 |
| | | |
| | | **600.000.000** |

**Eventualskyldur**

Øll teknað hald hava rindað eina trygd uppá kr. 300 fyri kubban, ið fæst aftur, um kubbin verður latin inn aftur til felagið.

Felagið hevur í 2007, undirskrivað ískoytisavtalu til leigusáttmála um leigu av skrivstovuhølum í Havn fram til 1. juli 2012 við 3 mánað uppsagnartíð, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2012.

Felagið hevur undirskrivað tænastusáttmálar fyri røkt av vegum, undirsjóvartunli og útgerð pr. 14. februar 2005 fyri 1,3 mió.kr. árliga. Uppskot til endurnýggjan av sáttmálunum eru gjørd fyri 2008.

**Tryggingarviðurskifti**

| | |
|---|---|
| All Risk-trygging: | |
| Skaða á tunnil-/útgerð | 25.000.000 |
| Rakstrartap | 5.000.000 |
| | |
| Virkisábyrgdartrygging: | |
| Skaða á persón | 70.000.000 |
| Skaða á lutir | 15.000.000 |
| | |
| Ábyrgdartrygging: | |
| Ábyrgd nevnd- og stjórn pr. skaða/ár | 5.000.000 |
| | |
| Leysafætrygging: | |
| Skrivstovuinnbúgv og útgerð | 230.000 |
| Telduútgerð og tøkni | 270.000 |
| Vørugoymsla | 1.000.000 |
| Databeraratrygging | 500.000 |
| Meirkostnaðartrygging | 500.000 |
| Flytandi samskiftisútgerð | 85.000 |

Bilarnir eru ábyrgdar- og skrokktryggjaðir. Arbeiðsskaða- og vinnuferðatrygging er teknað.